# ík















sigast, at skotroyndirnar hjá neistaleikarunum vóru alt ov óneyvar, tí tær sótu sum oftast rættuliga nær at kroppinum á Agne, sum tí hevði lætt spæl.

Onkuntíð fekk Neistin minkað um munin niður í trý mál, men tá ið Katarina Stepanov legði Stjørnuna á odda 14-9 við brotskasti, tá ið einans góðir fýra minuttir vóru eftir at leika, noyddist sjálvt tann mest bjartskygdi Neistafjepparin síggja veruleikan í eyguni. Tað var ikki í ár, at Neistin skuldi vinna sítt fyrsta gullmerki í fremstu kvinnudeildini í mong ár.

Stjørnan var snøgt sagt ein klassa betur, tá ið avgerandi dysturin var leiktur, og tað var eisini fult uppiborið, at tær mikukvøldið tryggjaðu sær enn eitt føroyameistaraheiti í fremstu kvinnudeildini. Stuttligt var eisini at síggja tann øgiliga rómin á teimum mongu áskoðarunum, ið høvdu leitað sær úr Klaksvík til Havnar í illveðrinum at stuðla sínum liði. Rómurin var øgiligur, og hann var neyvan minni, tá ið Dúgvan seint mikukvøldið kom á Klaksvík við føroyameistarunum. Tá stóð nevnliga stór mannfjøld og tók ímóti, og hetjurnar vóru móttiknar við fýrverki og øðrum góðum, og skipað var fyri stórari samkomu í KÍ-høllini, har nógv fólk var komið saman at heilsa gulliðnum hjá Stjørnuni.

## FAKTA UM FINALUNA

**Neistin – Stjørnan 10-16(5-6)**

**Neistin:** Ása á Neystabø 3(1), Nicoleta R. Hansen 2, Kára á Dunga 2, Katrin á Neystabø 1, Unn Kragesteen 1, Annika Thomsen 1
**Stjørnan:** Alina Olaru 5, Katarina Stepanov 4(3), Anna Kristina Samons 2, Joan M. Djordjevic 2, Una Olsen 1, Bára S. Klakstein 1, Durita Christoffersen 1
**Brotskøst:** Neistin 3(1), Stjørnan 4(3)
**Útvísingar:** Neistin 5, Stjørnan 3
**Dómarar:** Kristian og Karstin Joensen – Komu væl frá uppgávuni, hóast tað tóktist sum um, at brøðurnir ikki høvdu dømt í eina tíð. F
**Áskoðarar:** full høll

